# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

30. mai fingu Rúna Sumberg og Torstein Vestergaard, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3440 g og var 50 cm langur.

10. juni fingu Ann Ellefsen og Petur Mittún, Hoyvík. ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3750 gr.

10. juni fingu Annvør og Christian Nielsen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3950 gr.

10. juni fingu Rakul og Bárður Nielsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3850 gr.

10. juni fingu Jóna H. Gudmundsen, Sandavágur og Bogi Jacobsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

10. juni fingu Thora og Búi Holm, Bøur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

11. juni fingu Sólrun Debes Heinesen og Michael Østergaard í Esbjerg, ein drong, sum var 55 cm. langur og vigaði 4425 gr.

11. juni fingu Tórgerð H. Jensen og Jóan Petur Clementsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

12. juni fingu Karina Viderø Jensen og Búi Dahl, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

12. juni fingu Minny Elttør og Pauli Waag, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

13. juni fingu Anna Marjun M. og Niels Johannessen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 1870 gr.

13. juni fingu Hallbjørg Danielsen og Hans Petur Højgaard, Saltangará, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3525 gr.

13. juni fingu Gudrun Gullbein og Sigurð Uni Simonsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm.long og vigaði 4000 gr.

15. juni fingu Malan Berg Hansen og Petur av Kák, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

## 70 ár

Í dag, 18. juni fyllir Mikkjal á Bergi, Klaksvík, 70 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

## 85 ár

Sunnudagin 19. juni fyllir Petronella Heinsen – Nella í Hoygarðinum – á Toftum 85 ár.

## Brúdleyp

Í dag, 18. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Guðrið Hansen og Leivur Jarnfoss. Veitsla verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Í dag, 18. juni kl. 14.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Rúna Feilberg Hansen úr Klaksvík og Dan Lamhauge úr Lamba. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 18.30 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Í dag, 18. juni kl. 14.00 giftast í Sandavágs kirkju Sigrid Hammer, Hvalba og Jón Edvard Petersen, Sandavágur. Døgurði verður fyir innbodnum á Hotel Vágum og opið hús verður í heiminum, Sóljuteigur 2 í Sandavági, frá kl. 20.00.

Í dag, 18. juni kl. 9.00 giftast í Vesturkirkjuni Anja Gaard Joensen, Tórshavn og Kári Sólstein, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 11.00.

Sunnudagin 19. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Maigunn Nattestad, Miðvágur og Tórstein Magnussen, Sørvágur.

## Prógv

Maria á Dul av Argjum hevur á Aalborg Universiteti lokið prógv sum Master innan Arbeiðsmarknaðar og starvsfólkaviðurskifti.

## Tøkk



Hjartaliga takk til tykkum øll, sum komu at heilsa uppá meg á mínum 100 ára føðingardegi hin 31. mai 2005.

Stóra tøkk til Gøtu kommunu, sum skipaði fyri føðingardegnum.
Tøkk til Måns, Dagbjørt og tær sum stákaðust og gjørdu alt so gott og hátíðarligt.
Somuleiðis ein tøkk til Filadelfia, Hargar, Bent og øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk til fjølmiðlar av umrøðu.
Tøkk fyri gávur, blómur og heilsanir.

**Blíðar heilsur**
**Mia á Støðini**
**Syðrugøta**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sigga Carolina Sørensen**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tykkum, sum hjálptu so væl á ymiskan hátt og við jarðarferðini og til ervið. Tøkk til tykkum, sum sendu blómur og kransar og takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vinarliga*
**Tage, Susanne, Jens, Heine, Annika og Beinta**

## Tøkk

Við deyða og jarðarferð hjá elskaðu mammu, vermammu og ommu okkara

**Lena Vilhelm**
Vági, fødd Nielsen úr Fámjin

vilja vit á henda hátt hjartaliga takka øllum tykkum sum hava sýnt samkenslu og hjálpsemi.

Hjartaliga tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Finn, Meiken, Henrik og Emilia**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda hjálp og samkenslu, tá okkara elskaði

**Poul Henrik Poulsen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Katrin og Sólja**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Petra Anna Sofía Joensen**
Nólsoy

doyði og fór til gravar.

Tøkk til tykkum, sum so trúliga vitjaðu hana í tí dagliga.
Tøkk til B7.
Tøkk til Sonju Klein prest, fyri troystarrík orð.
Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Føroya Felag móti Krabbameini.
Hjartans tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans Andrias, Róin, Sunrid, Eyðgerð og Aksel**

## Dagurin

**18. juni. Leontius,** deyður umleið ár 135. Heryvirmaður í rómverska herinum, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.
**19. juni. Gervasius,** deyður umleið ár 300. Gervasius og bróðirin Protasius vórðu tiknir av døgum í Milano.
**20. juni. Sylverius.** deyður ár 537. Hann var sonur pávans Hormisades og gjørdist seinni sjálvur pávi, men av politiskum grundum varð hann skjótt frákoyrdur. Navnið merkir *Skógarbúgvi*.